# ÓLAVSØKUPAKKIN ER SPRONGDUR Í LUFTINA

FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ HJÁ JÓANNESI EIDESGAARD ER TREYTAÐ AV POLITISKUM REFORMUM, SUM ENN HANGA Í LEYSUM LOFTI. TÍ VÆNTA LIMIRNIR Í FÍGGJARNEVNDINI UMFATANDI BROYTINGAR AV UPPSKOTINUM. TELVINGIN Í FÍGGJARNEVNDINI STENDUR NÚ FYRI FRAMMAN, MAÐURIN VIÐ BORÐSENDAN EITUR **ANFINN KALLSBERG**, OG HANN VÆNTAR EITT TURBULENT POLITISKT HEYST.



FÍGGJARLÓGIN

Heini í Skorini
Heini_skorini@yahoo.com

Fólkini rundanum hann siga, at hann dugir tað politiska handverkið sum fáur. Hann sigst hava eitt djúptøkið innlit í at kalla øll politisk málsøkir. Og hóast hann ikki gongur runt við teimum heilt stóru visjónunum um, hvussu heimurin skal broytast, so veit hann, hvussu man fær tingini ígjøgnum parlamentariska maskinaríið.

Eftir knøpp 30 ár í politikki er 61 ára gamli fólkafloksmaðurin av Viðareiði, Anfinn Kallsberg, framvegis í politiska ringinum. Hann stendur ikki í fremstu røð longur. Men sum formaður í løgtingsins fíggjarnevnd demonstrerar hann sítt vald við jøvnum millumbilum. T.d. í fjør, tá fíggjarnevndin gjørdi stór inntriv í fíggjarlógaruppskotið hjá Jóannesi Eidesgaard, sum í stóran mun var ein teknisk framskriving av tølunum frá 2008. Við Anfinni Kallsberg á odda telvaðu teir sjey fíggjarnevndarlimirnir seg fram til fleiri nýggjar íløgur, sum ikki vóru í uppskotinum hjá landsstýrinum. Og spurningurin varð reistur, hvør myndar búskaparpolitikkin í landinum. Er tað fíggjarmálaráðharrin? Ella formaðurin í fíggjarnevndini?

## Hallið verður størri

Løgtingið er í øllum førum ikki tann stempulmaskinan, sum frustrerað tingfólk onkuntíð hava gramt seg um, tá politikkurin burturav er myndaður í landsstýrinum og ikki í løgtinginum.

Nú skal maktbalansan millum løgting og landsstýrið aftur roynast, og longu nú eru tekin um, at fíggjarnevndin aftur í ár fer at fremja stórar broytingar í uppskotinum, sum Jóannes Eidesgaard bar niðan í tingið fyri nøkrum vikum síðani. Tað siga fleiri limir í fíggjarnevndini, sum Sosialurin hevur tosað við. Fíggjarlógin skal til aðru og triðju viðgerð í desember, og áðrenn tað skulu Kallsberg og kompaní koma við teirra tilmælum um, hvussu tølini fyri 2010 skulu síggja út.

– Nógv bendir á, at fíggjarlógaruppskotið hjá landsstýrinum ikki er eitt realistiskt boð uppá, hvussu fíggjarlógin fyri 2010 kemur at síggja út. Tí er sannlíkt, at fíggjarnevndin má endurskoða tølini og gera nøkur inntriv, sigur Anfinn Kallsberg úr telefonini av Viðareiði.

Saman við formanninum eru bæði Torbjørn Jacobsen úr Tjóðveldi og Magni Laksáfoss úr Sambandinum ivaleysir um, at tølini í uppskotinum hjá fíggjarmálaráðnum ikki samsvara við politiska og búskaparliga veruleikan, sum fleiri tinglimir vístu á longu undir fyrstu viðgerð. Uppskotið hjá Eidesgaard verður ákært fyri at vera eitt sminkað lík, bæði tí at uppskotið inniheldur sparingar, sum eingin politisk semja er um, og tí at uppskotið hevur bólkað fleiri rakstrarjáttanir undir íløgupartinum, sum gevur eina misvísandi mynd av samlaðu rakstrarútreiðslunum.

Størsti trupulleikin er í løtuni, at fleiri sparingar í uppskotinum hjá Eidesgaard eru treytaðar av lógarbroytingum, sum enn ikki eru komnar í tingið, og sum enn ikki hava fingið nakra politiska viðgerð. Tølini hjá fíggjarmálaráðnum hanga við øðrum orðum óloysiliga saman við politiskum reformum, sum enn hanga í leysari luft.

– Um hetta ikki kemur í rættlag, so hevur fíggjarlógin fyri 2010 eitt heilt øðrvísi útgangsstøði enn tað, sum fíggjarmálaráðið hevur kalkulerað við, sigur Anfinn Kallsberg.

Sum dømi um óavgreidd mál kann nevnast pensjónsreformurin, sum upprunaliga skuldi spara landskassanum umleið 25 milliónir krónur, hóast hetta talið ikki sær at halda. Síðani eru broytingarnar í inntøkutrygdini til fiskimenn, sum kann spara landskassanum góðar 40 milliónir krónur, um vit hyggja at útreiðslunum fyri 2009, og reformarnir í apoteksverkinum og sjúkrakassaskipanini kunnu samanlagt spara landskassanum 21 milliónir krónur. Hetta eru bert nakrar av fleiri lógarbroytingum, sum tølini í fíggjarlógaruppskotinum eru treytað av. Um politisk semja ikki fæst um øll málini í nærmastu framtíð, so kann fíggjarlógin enda við einum halli, sum er væl størri enn núverandi undirskotið á 767 milliónir krónur. Og so eru yvirskipaðu karmarnir sprongdir, sum løgtingið hevur samtykt við tí sonevnda ólavsøkupakkanum. Ein pakki, sum ásetir eitt mark fyri rakstrarútreiðslur, íløgur o.s.fr.

> Eg havi ongantíð upplivað so avmarkaða politiska viðgerð í samgonguni